**Formula-deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 15 | 9 | - | 4 | - | 2 | 25 | 11 | 14 | 31 |
| 2 NSÍ | 14 | 10 | - | 1 | - | 3 | 24 | 12 | 12 | 31 |
| 3 EB/S | 14 | 9 | - | 1 | - | 4 | 24 | 15 | 9 | 28 |
| 4 HB | 15 | 7 | - | 2 | - | 6 | 31 | 23 | 8 | 23 |
| 5 GÍ | 14 | 6 | - | 4 | - | 4 | 22 | 25 | -3 | 22 |
| 6 B71 | 14 | 5 | - | 3 | - | 6 | 24 | 24 | 0 | 18 |
| 7 Skála | 14 | 5 | - | 2 | - | 7 | 16 | 23 | -7 | 17 |
| 8 KÍ | 14 | 3 | - | 3 | - | 8 | 22 | 23 | -1 | 12 |
| 9 AB | 14 | 2 | - | 4 | - | 8 | 18 | 28 | -10 | 10 |
| 10 VB/S | 14 | 2 | - | 2 | - | 10 | 12 | 34 | -22 | 8 |

**1. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B68 | 14 | 13 | - | 1 | - | 0 | 48 | 9 | 39 | 40 |
| 2 FSV04 | 14 | 10 | - | 2 | - | 2 | 28 | 17 | 11 | 32 |
| 3 LÍF | 14 | 8 | - | 1 | - | 5 | 31 | 19 | 12 | 25 |
| 4 ÍF | 13 | 6 | - | 4 | - | 3 | 30 | 13 | 17 | 22 |
| 5 TB | 14 | 5 | - | 3 | - | 6 | 19 | 15 | 4 | 18 |
| 6 NSÍ | 14 | 6 | - | 0 | - | 8 | 28 | 34 | -6 | 18 |
| 7 HB | 13 | 4 | - | 2 | - | 7 | 19 | 29 | -10 | 14 |
| 8 SÍ | 14 | 3 | - | 3 | - | 8 | 15 | 27 | -12 | 12 |
| 9 KÍ | 14 | 3 | - | 2 | - | 9 | 17 | 34 | -17 | 11 |
| 10 B36 | 14 | 1 | - | 2 | - | 11 | 9 | 47 | -38 | 5 |

# ánni



*Sannur toppdystur verður við Løkin sunnudagin, tá NSÍ á øðrum plássi tekur ímóti EB/Streymi á triðja plássi. Við sigri kunnu Anderson og hansara liðfelagar í NSÍ økja um munin niður til EB/Streym, meðan Marni Djurhuus og EB/Streymur við einum sigri kunnu leggja seg undir liðuna á NSÍ í oddinum.*

úrtøku.

Magnus Skoralíð, sum fyri nøkrum árum síðani spældi við GÍ, hevur seinastu árini aftur verið í barndómsfelagnum í Leirvík. Nú hevur hann gjørt av aftur at royna seg í Gøtu.

Tað hevur týdning fyri GÍ, at liðformaðurin og undangongumaðurin Sámal Joensen verður tøkur aftur. Men tað er samstundis hugaligt hjá gøtumonnum at staðfesta, at tað hevur borið væl til, hóast Sámal hevur verið skaddur.

## Spæla um 6. plássið

Eftir at tað var rættuligt flog yvir skálamonnum fyrstu umførini og dystirnar eftir at John Petersen var komin aftur á gamlar gøtur, hevur tað seinastu ferðirnar verið eitt sindur torførari.

Bæði Skála og B71 hava verið millum feløgini, sum hava víst positivt og konstruktivt fótbóltsspæl. Tí kann roknast við áhugaverdari uppgerð millum hesi bæði feløgini sunnudagin.

Á stigatalvuni fór B71 við sigrinum á AB framum Skála. Gestirnir av Skála hava møguleika við fullari úrtøku á Sandi at taka 6. plássið aftur frá sandoyingum.

## Meistarakreppa

HB tapti mikukvøldið ímóti B36, og hósmorgunin bórust tíðindini um, at venjarin hevði fingið sekkin. Heðin Askham, sum altíð hevur verið HB-ari, skal í Vági hava ábyrgdina av meistaraliðnum saman við einum øðrum svornum HB-ara. Talan er um gamla toppskjúttan Gunnar Mohr.

VB/Sumba vísti í fyrru hálvfinaluni í Gundadali, at teir væl duga at geva HB ein skarpan gang. Nú eru teir á heimavølli, og úrtøka ímóti meistarunum hevði lyft teir nærri bjargingini.

Um kappingarárið hjá HB ikki skal heilt miseydnast, so er alneyðugt hjá teimum við Andrew av Fløtum á liðnum at fáa fulla úrtøku sunnudagin og í seinnu hálvfinaluni í Vági at spæla seg í steypafinaluna. Um hetta eydnast, so verður framvegis møguleiki fyri, at HB bæði kann gerast steypavinnari og meistari. Um tað ikki eydnast verður talan um totalt kiksað kappingarár. Í hvussu so er sæð við HB brillum.

## Við – ikki við

Allir Tøkir

Allir Tøkir

Leikbann: Arnhold Berg
Ikki tøkur: Pauli G. Hansen (burturstaddur), John Petersen (burturstaddur)
Við aftur: Alexandur G. Johansen (vøddaskaði), Poul N. Poulsen (knæskaði)

VB/Sumba:
Leikbann: Martin Tausen

# B/Streymi við Løkin

| | 07 | '06 | 06 | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36-GÍ | - | 1-1 | 0-0 | 3-1 | 3-0 | 0-2 | 4-0 | 2-3 | 3-1 | 3-1 | 4-0 | 1-1 | 5-2 | 7-3-2 | 29-12 |
| VB/S-HB | - | 1-1 | - | 2-2 | 1-0 | 0-2 | 2-3 | 0-0 | 2-0 | 0-0 | 1-0 | 1-1 | 1-1 | 3-6-2 | 11-10 |
| NSÍ-EB/S | - | 3-2 | 2-0 | 2-5 | - | 1-0 | 3-0 | 4-0 | 1-0 | - | - | - | - | 6-0-1 | 16-7 |
| B71-Skála | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| KÍ-AB | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |